# Hárið skal eisini vera snøgt til stevnuna

**Nú norðoyastevnan liggur fyri framman hava frisørarnir nógv at gera, - eisini Jacoba Staksá sum hevur salong sína á Viðareiði. Í síðstu viku arbeiddi hon hvørt kvøld til midnátt**

FRISØR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Bárður*



*– Hetta hevur verið ein strævin vika, sigur Jacoba Staksá, sum her ordnar hárið hjá bygdarkonuni Eydnu*

**Viðareiði:** – Túsund takk fyri Jacoba. Hetta er akkurát, sum eg vildi hava tað.

Ein nøgdur kundi hevur gjørt sær hárið á salongini hjá Jacobu á Viðareiði, og skal nú gjalda fyri viðgerðina.

Í einum øðrum stóli situr ein ungur maður úr bygdini við einum løgnum plastikkskapi á høvdinum. Hann er í ferð við at lita sær hárið.

Og á kalendaranum fyri henda fríggjadagin í farnu viku standa tveir kundar aftrat, tveir brøður av Viðareiði.

- Teir skuldu verið her hvørja løtu, sigur Jacoba, meðan hon tekur móti peninginum. – Tú, Bárður set teg bara í stólin.

– Og tit báðir úr høvuðsstaðnum. Vilja tit ikki hava ein kaffimunn? Tað er klárt!

Vit takka nei, tí vit hava júst drukkið ein kaffimunn í einum øðrum húsum. Vit biðja hana goyma hann til eina aðru ferð.

Jacoba fønar nú hárið hjá kundanum, samstundis sum vit fáa í lag eitt stutt prát við hana um salongina.

## Strævin vika

Hóast norðoyastevnan er heimahoyrandi í Klaksvík, so merkja eisini fólkini í hinum bygdunum í Norðoyggjum til fyrireikingarnar av hesi stevnuni.

Jacoba Staksá á Viðareiði, sum í kjallara sínum hevur innrættað sær eina salong, er ein teirra.

– Eg læt faktiskt upp her í kjallaranum til norðoyastevnuna í 1998, greiður Jacoba frá.

Fríggjadagin í farnu viku hevði hon aftur úr at gera. Ein orsøk var norðoyastevnan sum verður nú um vikuskiftið, men ein onnur orsøk er, at salongin verður stongd í eina mánað, tí hon fer í summarfrí.

– Tað verður gott at fáa feriu nú. Hetta hevur verið ein sera strævin vika, sigur hon, meðan hon strípar hárið hjá bygdarkonuni Eydnu.

## Tveir litir

Nú klaksvíkingar fyrireika seg til stevnuna – og aðrir norðoyingar við teimum – hevur Jacoba havt úr at gera.

– Jú, hetta hevur verið ein strævin vika. Eg havi arbeitt til midnátt hvørt einasta kvøld í vikuni, sigur hon.

Fríggjadagin stóðu níggju kundar á kalendara hennara. Eydna var ein teirra, Bárður ein annar, og eftir tey bæði tveir brøður. Og so var liðugt fyri tann dagin.

Jacoba var útlærd sum frisørur í Klippistovuni í Havn í 1992, og síðani tá hava nógvir viðingar fingið sær hárið gjørt í salong hennara.

Onkutíð er hon eisini úti hjá fólki, sum av einihvørjari orsøk ikki kunnu koma til hana í salongini.

– Eg haldi, at tað er so deiligt at hava eina salong her í bygdini, sigur Eydna, ið sum oftast fær sær hárið gjørt hjá Jacobu. Í dag fær hon strípað sær hárið í tveimum litum.

## Strípingar

Henda vikan hevur sum nevnt verið strævin hjá henni, m.a. í samband við norðoyastevnuna.

Óhugsandi er ikki, at fleiri hava gjørt sær hárið í sambandi við framførsluna hjá tónleikabólkinum "Kandis", sum skuldi spæla á Hotel Norð hetta sama kvøldið. Kanska onkur ger sær hárið til kongaligu vitjanina seinni í mánaðinum.

Eydna er liðug, men Bárður av Viðareiði hevur um somu tíð havt eina liting í hátinum. Hann skal nú gerast liðugur, áðrenn brøðurnir báðir, Absalon og Mikkjal skulu snøggast.

Her er eingin steðgur í hjá Jacobu. Hon letur seg kortini ikki órógva av hesum, men heldur so trúliga á, til hesin arbeiðsdagurin fær ein enda – nakað fyrri enn hinir dagarnir í vikuni.

## Helvtin úr bygdini

Flestu kundarnir í salongini koma sum vituligt er av Viðareiði, men onkur kemur eisini sunnan úr Hvannasundi at fáa sær hárið gjørt á Viðareiði.

Annars so koma familja og vinir úr Klaksvík til Jacobu at gera sær hárið, eins og onnur sum hava eitthvørt tilknýti til bygdini.

Á Viðareiði búgva eini 350 fólk, og tað er helst ikki ov mikið sagt, at ein helmingur av teimum ganga klipt ella hárviðgjørd frá Jacobu.

Salongin er nú farin í summarfrí, og letur ikki uppaftur fyrrenn um ein mánað.



*Brøðurnir báðir - Mikkjal (4 ár) og Absalon Sørensen (9 ár) – skulu nú til frisør hjá Jacobu. Har eru nógv modell at velja millum*

**Vit klára málið**
Umseting til danskt og enskt
· Heimasíður
· Faldarar
· Avtalur
· Leiðbeiningar
· v.m.
pronoun
Tórgarðsgøta 19, 100 Tórshavn
Tlf: 520215 kjj@kallnet.fo
www.pronoun.fo